Holst hongur í

Lyngby heldur fram við at fáa góð úrslit í næstbestu donsku deildini. Felagið spældi í gjár lokaluppgerð ímóti AB, og tað eydnaðist Christian Holst Lamhauge og teimum at vinna dystin 2-1. Málini komu í dystinum. Fremad Amager legði seg fram um 1-0 við brotssparki eftir 75 minuttir, men fimm minuttir seinni javnaði AB. Og so var tað, tá ið 90 minuttir vóru spældir, at Mikkel Beckmann skoraði sigursmálið hjá Lyngby. Christian Lamhauge Holst spældi allan dystin í álopinum hjá Lyngby, sum framvegis liggur trý og fýra stig aftanfyri tey bæði fremstu liðini í deildini. Lyngby eigur enntá ein dyst til góðar mótvegis teimum.

Rógvi og teir vunnu generalroyndina

Næsta vikuskiftið byrjar íslenska landskappingin, og um vikuskiftið spældi KR sín seinasta venjingardyst. Dysturin var ímóti Breiðablik, og KR vann dystin 1-0. Einasta málið í dystinum kom eftir 42 minuttir, tá ið Skúli Jón Friðgeirsson skoraði. Rógi Jacobsen byrjaði dystin á vøllinum, men hann varð skiftur út góðar 20 minuttir fyri leiklok.

Byrial gevst at spæla fótbólt

Johan Byrial Hansen setir gaggurnar á hillina fyri at brúka meira tíð til familjuna og arbeiði. Í gjár spældi hann seinasta heimadystin fyri AC Horsens. Hann var liðformaður og var við til at vinna knúsandi sigur á Brøndby

FÓTBÓLTUR

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

30 ára gamli Johan Byrial Hansen gevst at spæla fótbólt. Tá ið sáttmálin við danska superligafelagið AC Horsens gongur út í næstum, setir Johan gaggurnar á hillina, og har verða tær standandi – fyri well.

– Eg havi hugsað um hetta í longri tíð, og fyrr í vár tók eg avgerðina. Eg havi brúkt nógv tíð til fótbóltin, og tað fer bara meira og meira tíð til fótbólt. Tað gongur út yvir familjuna og arbeiðið, og nú haldi eg, at eg skal geva teimum nakað aftur fyri at hava verið so tolin móti mær, sigur Johan Byrial Hansen, sum hevur spælt 15 landsdystir fyri Føroyar.

– Eg havi ein lítlan son, og eitt barn afturat er í væntu. Harafturat eru nýggjar avbjóðingar fyri framman í arbeiðnum, og hetta hevur so alt við sær, at eg frameftir vil brúka meira tíð til familjuna og arbeiði, og so má fótbólturin lúta, sigur hann.

Framúr endi

Johan Byrial Hansen kom á føroyska fótbóltslandsliðið í 2000, og hann spældi javnan við liðnum fram til í fjør. Johan hevur verið stuðulsspælari hjá AC Horsens í fleiri ár, og felagið hevur eisini boðið honum nýggjan sáttmála. Seinasta árið hevur Horsens spælt í superliguni, og har hevur tað gingið heilt væl hjá liðnum, sum langt síðani hevur tryggjað sær eitt ár afturat í bestu deildini.

Í gjár spældi Johan sín dyst nummar 205 fyri AC Horsens, og í dagens anledning var hann liðformaður á liðnum. Og tað var vorðið sum dagur, tí AC Horsens vann knúsandi 4-1 sigur á Brøndby og avgjørdi harvið stríðið um danska meistaraheitið.

– Tað kundi ikki verið ein betur dagur at spæla seinasta dystin á heimavølli, og eg eri sjálvandi keddur um, at eg nú skal gevast. Men avgerðin er tikin, og tað er altíð stuttligari at gevast á toppinum, sigur Johan Byrial Hansen eftir søta sigurin á Brøndby.

Johan Byrial Hansen fekk eitt ordans farvæl í Horsens, har hann sum liðskipari var við til at knúsa allar gulldreymir hjá Brøndby

Ætlar tú tær als ikki at spæla fótbólt aftur?

– Næsta hálva árið fari eg so einki at gera við fótbólt, og eg rokni ikki við, at verður lætt at koma afturíaftur eftir tað. Men eg rokni nú heldur ikki við, at tað verður aktuelt.

Skála-GÍ 1-2 (0-2):

GÍ kom undan trýstinum

SKÁLA

GÍ

Eftir tvey mála GÍ leiðlsu í 1. hálvleiki var heimaliðið á Skála leikliga oman á eftir steðgin, men tað eydnaðist teimum bara at fáa mál upp á brotsspark

FÓTBÓLTUR

Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Tað er rættiligur stígur komin í fótbóltslívið á Skála. Áhugin er framvegis stórur, men dagsskráin er ein heilt onnur nú, enn hon hevur verið tey bæði undanfarnu árini. Tá hevur tað snúð seg um at stríðast um heiðursmerkini og meistaraskapin. Nú snýr tað seg um at sleppa úr niðurflytingar siropinum.

Undanfarnu árini hava teir á Skála mest sum hvørja ferð verið í stinnastu útgávu. Nú eru teir orsaka av skaðum og leikbannum noyddir langt út á bonkarendan fyri at finna fólk til teir fyrstu ellivu. Serliga meint er tað, at fleiri av stuðulsspælarunum teljast millum teir, ið sita uttanfyri við skaða.

Í Gøtu er søgan tann mótsatta av tí, sum hon var í fjør. Tá vóru tað teir, sum vóru á veg í næstbestu deildina, tá vóru tað teir, sum aftur og aftur vóru noyddir at broyta liðið, og tá var tað ikki fyrrenn í síðsta bríkslinum í síðsta umfarinum – tá ið teir vóru á Skála – at tað eydnaðist at bjarga rættinum at halda fram í fremstu rød.

Nú gongur sum eftir ánni hjá gøtumonnum. Hugburðurin er fínur, teir hava mest sum alt fólkið tókt so at siga hvørja einastu ferð, teir halda tætt í verjupartinum, og teir fáa málini, sum gera tað so nógv léttari at spæla.

Hesa ferð løgdu teir seg á odda við brotssparki beinanvegin. Dómarin metti, at hondin hjá miðverjanum Milan Curcic hevði spælt bóltin, og Gunnar Nielsen, sum var einsamallur á GÍ toppinum og var eitt sindur stuðlaður av Sámali Joensen, var tryggur úr ellivu metrum.

Tað gekk javnt á í 1. hálvleiki, tá ið Bogi Gregersen hevði bestu Skála royndina eftir horna, men gøtumenn bjargaðu stútaranum á málstrikuni. Tað var bara GÍ, sum fekk mál. Smáar tíggju minuttir undan hvíldini var uppspælið í høgru. Áslakur R. Petersen legði innfyri, og Hanus Jacobsen, sum hevur sera góða nøs fyri málmøguleikum, kom inn frá vinstru og smekkaði í kassan.

Skála fann stílin

Eftir steðgin var mótbrekkan hjá heimaliðnum á Skála tung. Teir vóru aftanfyri 2-0, og fyrstu løtuna bendi ikki so nógv á, at tað skuldi eydnast at koma afturíaftur. Sum hálvleikurin leið hevði GÍ – ivaleyst var tað ótilvitað – alt størri hug at hugsa um verjupartin, og harvið gekk nógv fyri seg á teirra hálvu.

Skálamenn umskipaðu eitt sindur, og teir fingu betri fatur á samanspælinum. Eftir ein tíma fingu teir brotsspark. Kanska var tað dømt fyri at halda í brotsteiginum. Bogi Gregersen umsetti til fulnar, og so var spurningurin, um tað skuldi eydnast Skála at fáa stig, ella um GÍ skuldi fara við øllum.

Skála hevði ilt við at spæla seg til upplagdar møguleikar. Bestu royndina átti Poul N. Poulsen, tá ið hann sendi skot úti frá og upp um málið.

Tólv minuttir undan leikloki varð Pætur Dam Jacobsen vístur av vøllinum, tá ið hann fyri aðru ferð hevði sæð gult, og so var léttari hjá GÍ at halda tørn.

Pauli G. Hansen var á Skála beinkinum hesa ferð. Hann er kortini ikki heilt fullførur enn. Men á Skála siga teir seg hava vónir fyri, at bæði Pauli og Borgar Kristiansen um ikki so langa tíð aftur fara at verða førir fyri at venja við fullari ferð og harvið at spæla. Hvussu tað verður við tveimum øðrum skaddum lyklaspælarum – Alexandur Johansen og Jónhardi Frederiksberg – er framvegis í tí óvissa.